# Vallærugreinar

Í 8. flokki hevur tú sum næmingur møguleika at velja teg inn á vallærugreinar. Hetta er bert ein møguleiki og ikki eitt krav.

Tað ber til at hava í mesta lagi 37 undirvísingartímar um vikuna í 8. flokki. 28 tímar av hesum eru kravdar lærugreinar. Tær eru, kristni, danskt, føroyskt, støddfrøði, enskt, søga/samtíð, samfelagsfrøði, landalæra, lívfrøði og ítróttur.

Um tú ætlar tær at taka eina víðari útbúgving, so skalt tú tó vera varugur við, at tað kunnu vera nøkur upptøku krøv, sum tú verður noyddur at hava í huga, tá tú avger, um tú vilt hava vallærugreinar ella ikki.

Um tú ætlar tær at lesa víðari á einari miðnámsútbúgving eru tað serliga lærugreinarnar týskt og alis/evnafrøði, sum verða kravdar av teimum, sum søkja inn.

## Miðnám

Hugbreyt - Glasir

Tað er eitt krav, at tú hevur havt týskt í fólkaskúlanum fyri at verða upptikin á hugbreyt.

Náttúrubreyt - Glasir

Tað er eitt krav, at tú hevur havt alis/evnafrøði í 2 ár í fólkaskúlanum ella aðra royndarfyrireiking.

Heim - MIV - Tilfeingisbreyt – Miðnám í Vestmanna

Tað er eitt krav, at tú hevur havt alis/evnafrøði í 2 ár í fólkaskúlanum ella aðra royndarfyrireiking.

Tekniski Skúlin í Klaksvík (tsk.fo) – Tøknibreyt

Tað er eitt krav, at tú hevur havt alis/evnafrøði í 2 ár í fólkaskúlanum ella aðra royndarfyrireiking.

## Vallærugreinar í Hoyvíkar skúla

Týskt (4 tímar)

Týskt 8-10 - namsaetlanir.fo

Alis og evnafrøði (3 tímar)

Alis- og evnafrøði 7-9 - namsaetlanir.fo

Smíð (2 tímar)

Smíð 4-10 - namsaetlanir.fo

Leiklist (2 tímar)

Leiklist 8-10 - namsaetlanir.fo

**Vegleiðing**

Annika við Skipá er skúlavegleiðari í Hoyvíkar skúla.

Um tit hava spurningar viðvíkjandi lærugreinavalinum, upptøkukrøvum ella øðrum í hesum sambandi, kunnu tit skriva til hennara á annika.skipa@skulin.fo